# liðið burturav




*Fjóðru ferð í fimm ár kundi Jón Rasmussen hjá StÍF taka ímóti stóra steypinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA UM FINALUNA

**StÍF-VÍF 28-23(15-12)**
**StÍF:** Sveinur Justinussen 7(3), Leivur Justinussen 7, Alexandur Johansen 5, Pauli Hansen 4, Bent Djurhuus 3, Tummas Johansen 1(1), Borgar Danielsen 1
**VÍF:** Harald Bjørgvin 6, Agnar Joensen 5, Sámal Joensen 5(1), Áki G. Olsen 3, Johnny Joensen 2, Daniel Rapa 1, Jákup Súni Andreasen 1
**Brotskøst:** StÍF 6(4), VÍF 4(1)
**Útvísingar:** StÍF 2, VÍF 4
**Dómarar:** Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen - Teir løgdu eina greiða linju frá fyrsta bríksli, og tóktust allan dystin sera avgjørdir í sínum dómum. Avrikið var gott, hóast onkur hevnisøka seint í dystinum átti at verið revsað við reyðum korti.
**Áskoðarar:** 1200

frá verjuni framman fyri sær. StÍF kom ferð aftaná ferð til løtt mál, har teir vóru púrasta leysir við málverjanum.

### Krevjandi spælistílur

Nógv ferð var á dystinum, og ofta gekk tað rættuliga skjótt úr enda í annan. Serliga hjá StÍF kravdi hetta nógvar kreftir, tí strandingar skiftu ógvuliga lítið út, og tað var fyri tað mesta teir seks, Alexandur, Sveinur, Pauli, Leivur, Borgar og Bent, sum vóru á vøllinum fyri StÍF, bæði í álopi og verju. Spælistílurin hjá strandingum við offensivu verjuni og nógvu ferðini á álopsspælinum krevur nógva orku, men hetta tóktist tó ikki ávirka avrikið hjá strandingum.

Tað hjálpir kanska eisini, at hjá StÍF hvílir tað ikki so nógv á herðunum á einum leikara, soleiðis sum tað kanska ger á øðrum liðum. Strandingar hava fleiri mans, ið taka ábyrgd, og tað er altíð ein stórur styrkur. Hjá vestmenningum tóktist tað hinvegin ganga ógvuliga striltið við at finna rútmuna í álopsspælinum, og roynt var við fleiri ymiskum leikarum, so sum Daniel Rapa og Karl Johan Djurhuus á spælskiparaplássinum, men uttan at hetta tó gav úrslit.

### Marian bjargaði í avgerandi løtum

Hóast StÍF hevði munin á VÍF so at siga allan dystin, so var tað tó ikki so, at VÍF misti sambandið við strandingar. Vestmenningar royndu at hanga í, og tvær ferðir í seinna hálvleiki komu teir upp á javnt. Teir høvdu eisini møguleikan til at leggja seg á odda, men málverjin hjá StÍF, Marian Cirloganescu, hevði nakrar frálíkar bjargingar júst, tá ið VÍF var um at venda dystinum.

Hinvegin má eisini staðfestast, at tað er ikki ráð til hjá VÍF at brenna upplagdar málmøguleikar, tá ið teir standa til at venda dystinum.

Bjargingarnar hjá Marian tóktust taka mótið frá vestmenningum, sum fullu í fátt seinastu minuttirnar av dystinum, og sum enn einaferð noyddust at staðfesta, at strandingar framvegis eru steypamarran hjá teimum, nú StÍF sætta árið á rað sløktu steypadreymarnar hjá vestmenningum.

### Hvussu við landskappingini

Sum nevnt aðrastaðnis her á síðunum, so eru vestmenningar illa sperdir av skaðum hjá lyklaleikarum í løtuni, og tað kann koma at kosta dýrt, nú landskappingin fer at halla. VÍF hevur ikki so øgiligt fólk at taka av, og spurningurin er eisini, um steypaósigurin er at ávirka sjálvsálitið í hópinum.

Undir øllum umstøðum kann staðfestast, at strandingar leygardagin enn einaferð prógvaðu, at tá ið steypakappingin er á skránni, so hava teir okkurt heilt serligt í sær, og tí kunnu teir annað árið á rað rópa seg steypavinnarar í manshondbólti.

---

eru nakrir vøddar, ið hava fingið stóran skaða. Tá ið eg fór út í dystinum leygardagin, hevði onga føling í arminum, og eg má viðganga, at eg vænti, at tað endar við skurðviðgerð, sigur Ingi Olsen.

Spurdur, um hettta merkir, at hann hevur spælt sín seinasta dyst fyri VÍF, sigur Ingi Olsen. - Tað er ilt at siga. Eg spæli neyvan aftur í ár, og tað kann eisini væl verða, at tað als ikki verður mín avgerð, um eg skal halda fram við at spæla hondbólt, sigur hann.

### Fleiri lyklaleikarar skaddir

Missurin av Inga er sjálvsagt stórur hjá oddaliðnum VÍF, og tá ið bróðurin Áki samstundis eisini er skaddur í ein mánað ella so, merkir hetta, at vestmenningar eru nógv skerdir næstu vikurnar. Harafturat hevur náttúrligi avloysarin hjá Inga á spælskiparaplássinum, Áki G. Olsen, eisini fingið ein skaða í økslina, men hvussu álvarsligur hann er, veit Ingi ikki at siga enn.

Um so er, at Áki G.eisini noyðast at sita uttan fyri í eina tíð, so kann ikki sigast annað, enn at tað er eitt amputerað VÍF-lið, sum fer undir endaspurtin í landskappingini, har teir skulu royna at verja oddasessin hjá sær.

---

Alexandur Johansen:

## – Árið er bjargað

**Ein av royndastu leikarunum hjá StÍF, Alexandur Johansen, helt eftir dystin fyri, at nú var árið hjá StÍF bjargað**



STEYPAPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Alexandur Johansen hevur roynt tað so ofta áður, at tað nærum er vorðin ein vani hjá honum at spæla steypafinalu, og næstan líka so ofta hevur hann vunnið.

– Hetta er akkurát vit. Tá ið tað eru slíkir dystir, har tað er alt ella einki, so spæla og stríðast vit sum einglar, sigur hann.

Steypasigurin hevur stóran týdning fyri StÍF, sigur Alexandur. - Nú er árið hjá okkum bjargað, hóast fleiri umfør eru eftir í landskappingini. Vit hava ikki so nógv at spæla fyri har, men kunnu fara eftir bronsuni. Tað skal heldur ikki verða nakar ivi um, at vit ikki fara at leggja okkum afturá, nú vit eru steypavinnarar, sigur Alexandur Johansen, sum eins og liðfelagin, Pauli Hansen, í næstum fer undir at fyrireikingarnar til landskappingina í fótbólti, har teir báðir eru stuðulsleikarar á besta liðnum hjá Skála.

---

Pauli Hansen:

## – Vit eru best í slíkum dystum

**Spælskiparin hjá strandingum, Pauli Hansen, hevði ein heilt góðan dag leygardagin, og hann fegnaðist um steypasigurin**



STEYPAPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Umframt at verða ein av bestu fótbóltsspælarunum í landinum, so er Pauli Hansen eisini vorðin ein týðandi leikari á besta liðnum hjá StÍF. Bæði í álopinum, har hann er spælskipari, og ikki minst í verjuni, har Pauli hevur leiklutin sum tann, ið verjir frammalaga mitt á og skal órógva spælskiparan hjá mótstøðuliðnum.

Tá ið vit fingu orðið á Paula, beint áðrenn teir fóru upp á pallin eftir gullkrónum og steypi, var hann, sum verða man, sera fegin.

– Hetta er veldugt. Eg veit ikki, hvussu tað ber til, men vit eru altso best, tá ið talan er um slíkar dystir, har tað er antin eller. Tá fáa vit ein serligan gejst og stríðast sum úlvar, sigur Pauli.

– Eg skuldi verja frammi á Inga, men tíverri fyri teir noyðist hann út, og tað ger uppgávuna hjá okkum munandi lættari, heldur Pauli Hansen og leggur afturat, at tað eisini var umráðandi, at skjúttarnir hjá StÍF komu í gongd, tí teir hava sera stóran týdning fyri liðið.